# Gentan við stóru røddini



**What's In It For Me, sang Amy Diamond og gjørdist kend í fleiri londum. Nú kemur unga svenska poppstjørna til Føroya fyri fyrstu ferð**

**Svenska ungdómsstjørnan Amy Diamond hevur eina rødd, sum tær stóru songkvinnurnar. Hon hevur havt hitt í fleiri londum og er yngsti sangarin, ið nakrantíð hevur vunnið eina virðisløn á Nordic Music Award**

15 ára gamla Amy Diamond gjørdist kend um øll norðanlond við sanginum What's In It For Me, men bæði áðrenn hendan sangin – og serliga síðani – hevur hon gjørt nógv við tónleikin.

Hon hevur sungið í sjónvarpssendingum, givið fløgur út og verið við á stórum konsertum og festivalum. Ein av stóru løtunum hjá Amy var, tá ið hon í 2005 vann Nordic Music Awards.

### Gjøgnumbrot og virðislønir

Amy Diamond hevur svenska mammu og enskan pápa, og fyrstu fýra árini av lívi sínum búði hon í Onglandi. Síðandi fluttu til Svøríkis at búgva.

Sum smágenta dugdi Amy væl at standa á skoytum, og hon vann nógvar kappingar. Hon gekk eisini á dansi- og sjónleikaskúla, og alt hetta hevði við sær, at unga Amy dugdi væl at framføra fyri fólki. Tá ið tónleikurin so bankaði á dyrnar, var ein veruliga barnastjørna fødd. Amy Diamond sang í sjónvarpssendingum í Svøríki, og talentið var so stórt, at plátufeløg fingu áhuga fyri henni. Í 2005 fekk hon veruliga gjøgnumbrotið hjá sær við sanginum What's In It For Me, sum gjørdist eitt hitt í fleiri londum.

Heima í Svøríki seldi fyrsta útgávan hjá Amy Diamond óhoyrt væl, konsertframførslurnar vóru sannførandi, og tað endaði við fleiri virðislønum til ungu songkvinnuna hetta árið. Millum annað vann hon Nordic Music Awards fyri besta norðurlendska hittið, og hon er yngsti sangarin, ið nakrantíð hevur vunnið hesa virðisløn.

Amy vann eisini aðrar virðislønir fyri sína fyrstu útgávu og sangin What's In It For Me, og millum annað er hon yngsti sangarin, ið nakrantíð er tilnevndur til eina svenska Grammy.

### Nýggj fløga

Amy Diamond hevur úr at gera, tí hon hevur eisini gjørt avtalur við fyritøkur í Svøríki um PR-arbeiði, og hon hevur millum annað verið andlit hjá ítróttarketuni Stadium í lýsingarátøkum.

Tónleikurin stendur tó framvegis ovast á listanum hjá Amy Diamond, og í summar er hon aftur farin í studio. Har skulu sangir til eina nýggja útgávu takast upp. Nýggja útgávan frá Amy Diamond kemur væntandi út seinni í ár.

Men áðrenn tað stendur henna fyrsta Føroyaferð á skránni, og Amy fer at leggja fyri við fyrstu framførsluni á stóra pallinum leygardagin. Hon hevur nógvar ungar fjepparar, og lagt er upp til eina ordans konsert fyri bæði børn, ung og vaksin.

# Ung Stjørnuskot



**Tað er einki at ivast í, at onkur komandi stjørna í føroyskum tónleiki syngur við í Ungum Stjørnuskotum, sum er eitt ungdómskór við umleið 30 sangarum.**

**Millum tey, sum syngja í kórinum, eru summi, sum longu hava verið frammi í eitt nú sangleikunum Jósef og Fame, og onkur av hesum syngur eisini solo í kórinum.**

**Saman við teimum dugnaligu ungu sangarunum eru eisini góðir tónleikarar, sum taka sær av at spæla undir til sangirnar, sum umfata alt frá poppi til gospel.**

**Ung Stjørnuskot duga væl at framføra á palli, og tað verður spennandi at hoyra tey syngja til Føroya størsta festival.**